Januar 2024

betri trygging

Tryggingartreytir

# *Bátatrygging*

# Bátatrygging


## Tryggingargrundarlag 3

## A. Skrokktrygging v.m. 3

1.0 Tryggingin fevnir um 3
1.1 Gildistíð 3
2.0 Tryggjaðir lutir 3
2.1 Skrokkur 3
2.2 Skaðaorsøkir 3
2.3 Skaði á presendingar 3
2.4 Skaði á maskinu v.m. 3
2.5 Undantøk 4
2.6 Ábyrgd fyri samanstoyt 4
2.7 Bjargiløn og sleip 4
2.8 Landfrøðiligt øki 4
2.9 Lega 4
2.10 Ristorno 4
2.11 Sálarlig kreppuhjálp 5

## B. Tilvalstryggingar 5

3.0 Tryggingin kann eisini fevna um 5
3.1 Skrokkinteressa 5
3.2 Snellur 5
3.3 Veiða og útgerð 5
3.4 Manningarognir 5
3.5 Maskintrygging 5
3.6 Víðkað ábyrgdartrygging 6
3.7 Kosmetiskur skrokkskaði 6
3.8 Lægri sjálvsábyrgd á ”Ábyrgd fyri samanstoyt” 6

## C. Skaðafráboðan, skaðauppgerð v.m. 6

4.0 Verður skaði 6
5.0 Rætturin til endurgjald 7

## D. Felagsreglur 7

6.0 Felags fyri allar fulnaðir 7
6.1 Sjálvsábyrgd 7
6.2 Nýggjur eigari 8
6.3 Kríggj, náttúruvanlukkur v.m. 8
6.4 Skyldur tryggingartakarans 8
6.5 Tryggingargjald 8
6.6 Prístalsjavning 9
6.7 Uppsøgn 9
6.8 Onnur trygging 9
6.9 Rættargongd 9

## E. Bert galdandi fyri privatar tryggingar 9

7.0 Niðanfyristandandi ásetingar eru einans galdandi fyri privatar tryggingar 9
7.1 Angringarrættur 9
7.2 Ósemjur 9
7.3 Innanhýsis kæruviðgerin hjá Betri Trygging P/F 9
7.4 Kærunevndin 9
7.5 Yvirsýn 10
7.6 Rættarhjálp 10

# Bátatrygging

## Tryggingargrundarlag

Tryggingin veitir endurgjald eftir reglunum í Dansk Søforsikringskonvention af 2. april 1934, (hereftir nevnd konventiónin) vanligum sjótryggingarsiðvenjum umframt broytingum og ískoytum, sum standa í teimum niðanfyri tilskilaðu tryggingartreytunum.

## A. Skrokktrygging v.m.

### 1.0 Tryggingin fevnir um

Tryggingin fevnir um far/før undir 20 BT, sum nevnd eru í tryggingarskjalinum.

**1.1 Gildistíð**
**1.1.1** Trygging kann verða teknað annaðhvørt sum árstrygging ella sum trygging fyri styttri tíðarbil ella fyri túrin.

**1.1.2** Er tryggingin teknað fyri styttri tíðarbil enn eitt ár ella fyri túr, heldur tryggingin uppat, tá ið tíðarbilið er úti, ella túrurin er liðugur.

**1.1.3** Verður farið selt ella á annan hátt fær nýggjan eigara, fer tryggingin av sær sjálvum úr gildi.

**1.1.4** Er trygging teknað sum árstrygging, verður tryggingin longd fyri eitt ár í senn frá hvørjum árskifti uttan so, at tryggingartakarin ella tryggingin skrivliga hava sagt tryggingina upp.

### 2.0 Tryggjaðir lutir

Tá ið trygging verður teknað, skal tryggingartakarin gjølla gera sær greitt, hvat ið hann vil hava tryggjað. Tryggjað kann vera:

**2.1 Skrokkur**
**2.1.1** Tryggingin fevnir um skrokkin á farinum, maskinu, búnaðarlutir (inventar), føst fiskiamboð (undantikið snellur), elektriskan útbúnað, radiotól, nautisk tól, lívbátar, eykalutir og aðrar lutir, ið hoyra til farið og ikki eru ætlaðir til at brúka upp umborð.

**2.1.2** Skaði á radiotól og nautisk tól: Umframt sjálvábyrgdina, verður aldursfrádráttur gjørdur á sama hátt, sum fyri maskintryggingina, sí §§ 3.5.4 og 3.5.5.

**2.2 Skaðaorsøkir**
**2.2.1** Avmarkað av teimum undantøkum, sum eru nevnd í tryggingarskjalinum, tryggingartreytunum og konventiónini, fevnir tryggingin um allar skaðar á tryggjaða lutin, sum standast av brádligum og óvæntaðum hendingum í tryggingartíðarskeiðnum, eins og ásett í § 50 í konventiónini.

**2.3 Skaði á presendingar**
**2.3.1** Skaði á presendingar verður endurgoldin sum partur av skrokkinum.

**2.3.2** Umframt sjálvsábyrgdina verður frádráttur gjørdur í endurgjaldinum fyri presendingar, ið verður roknaður soleiðis:

| Aldur | Frádráttur |
|---|---|
| 0-1 ár | 0% |
| 2-3 ár | 10% |
| 4-5 ár | 30% |
| 6 ár og eldri | 50% |

Kann tryggingartakarin ikki skjalprógva framleiðsluárið, verður aldurin mettur at vera 6 ár.

**2.4 Skaði á maskinu v.m.**
Skaði á maskinu, leysamotorar, uttanborðadrev og spøl verður endurgoldin eftir § 155 í konventiónini. T.v.s. bert um skaðin er orsakaður av:

**2.4.1** Eldi ella spreinging í øðrum enn maskinu.

**2.4.2** Farið er sokkið, hvølvt, strandað ella rent á grunn.

**2.4.3** Farið hevur rent á fastan ella flótandi lut, heruppií ís.

**2.4.4** Valdsgerð og rán.

**2.4.5** Stuldur, sum ikki er framdur av manning ella ferðafólki.

**2.4.6** Sjóskaða ella leka sum annars verður endurgoldin sambært konventiónini.

# Bátatrygging

**2.5 Undantøk**
**2.5.1** Tryggingin veitir ikki endurgjald fyri skaða, sum er hendur orsakað av, at farið:

**2.5.2** Var vanrøkt, var ikki sjódygt, var ikki neyðuga útgjørt og neyðuga mannað, eisini um tryggjaði ikki var vitandi um hetta.

**2.5.3** Hevur verið nýtt til ólóglig endamál, eisini um tryggjaði ikki var vitandi um hetta.

**2.5.4** Hevur verið sleipað, uttan so at sleipið var neyðugt orsakað av skaða.

**2.5.5** Tryggingin veitir heldur ikki endurgjald:

**2.5.6** Fyri skaða, sum er gjørdur við vilja ella undir ávirkan av rúsdrekka, narkotika og euforiserandi evnum.

**2.5.7** Fyri tíðartap, ferðaútreiðslur, hýru og kostpening.

**2.5.8** Fyri útreiðslur, ið standast í sambandi við ekspropriatión, tá lagt verður hald á ella hildið verður aftur ella líknandi fyriskipan frá føroyskum ella fremmandum, lógligum ella ólógligum myndugleika.

**2.5.9** Fyri skaða, sum beinleiðis ella óbeinleiðis er orsakaður av ella hevur samband við kjarnorku og geislingar.

**2.5.10** Tryggingin fevnir ikki um endurgjald fyri skaðar, sum kunnu verða endurrindaðir sambært Kunngerð um grind og annan smáhval nr. 9 frá 23. januar 2017 (grindakunngerðin) við møguligum seinni broytingum. Endurgjald verður tó undir ongum umstøðum veitt fyri skaða á drev og leysamotorar. Tað er ein treyt fyri endurgjaldi, at boð frá grindaformonnum og sýslumonnum í sambandi við drápið eru fylgd, og at skaðin verður fráboðaður grindaformanninum og sýslumanninum á staðnum beinanvegin, tá skaðin hendir.

**2.6 Ábyrgd fyri samanstoyt**
**2.6.1** Um eingin eyka ábyrgdartrygging er teknað, fevnir tryggingin bert um ábyrgd fyri samanstoyt. Hægsta møguliga endurgjald fyri ábyrgd mótvegis triðjamanni er skrokktryggingarhæddin.

**Undantøk**
**2.6.2** Umframt undantøkini, ið eru nevnd í konventiónini, fevnir tryggingin ikki um:

**2.6.3** Skaða á fólk.

**2.6.4** Skaða á lutir, sum tryggingartakarin ella brúkarin av farinum eigur, ella sum hesir hava til láns, leigu, goymslu ella flutning, ella sum av aðrari orsøk eru í teirra varðveitslu.

**2.6.5** Skaðar í sambandi við vatnskíðkan.

**2.6.6** Endurgjald, sum tryggjaði bert vegna verandi sáttmálaviðurskifti skal gjalda medintereressentum í farinum ella til keypara av veiðuni.

**2.7 Bjargiløn og samsýning fyri sleip**
**2.7.1** Um tryggingin og eigarin av farinum, ið hjálpt hevur, ikki koma ásamt um samsýningina, verður málið lagt fyri Føroya Rætt til avgerðar.

**2.8 Landafrøðiligt øki**
**2.8.1** Tryggingin fevnir um skaða, ið gerst á teimum leiðum, sum eru tilskilaðar í tryggingarskjalinum.

**2.8.2** Hesar leiðir skulu altíð vera í samsvar við treytirnar frá myndugleikum.

**2.8.3** Siglingarleiðin fevnir eisini um Norðurlond og Stóra Bretland í upp til 60 dagar, uttan at tað ávirkar tryggingina. Longri tíðarskeið skulu fráboðast Betri Trygging, sum tekur støðu til um, ella undir hvørjum treytum, tryggingin kann halda fram.

**2.8.4** Til ber at tekna eykatrygging fyri víðkaða siglingarleið, um farið lýkur treytirnar fyri hesum.

**2.8.5** Tryggingin bøtir eisini skaða, ið hendir, tá ið farið verður tikið upp ella flotað og meðan tað stendur uppi á landi ella undir flutningi innanoyggja.

**2.9 Lega**
**2.9.1** Farið skal liggja á einum av tryggingini góðkendum plássi.

**2.10 Ristorno**
**2.10.1** Verður fullur skipsskaði, skal tryggingartakarin lata tryggingargjald fyri alt tryggingarskeiðið. Fyri árstrygging merkir hetta til dømis fyri restina av árinum.

**2.10.2** Tá ið farið verður selt og tryggingarskjalið ógilt, verður ristorno latið sambært §§ 38 og 113 í konventiónini.

**2.10.3** Ristorno verður bert latið, tá tryggingin verður sett úr gildi. Ristorno upp á kr. 100 ella minni verður ikki útgoldið.

# Bátatrygging

**2.10.4** Einki leguristorno verður latið.

**2.11 Sálarlig kreppuhjálp**
**2.11.1** Betri Trygging veitir endurgjald fyri sálarliga kreppuhjálp, um tryggingartakari ella onnur umborð á farinum hava verið beinleiðis uppi í einari hending við farinum, sum hevur elvt til bráðfeingis sálarliga kreppu, hevur samband við ein skaða, ið er fevndur av tryggingini, og annaðhvørt hevur:
**a)** kravt mannalív.
**b)** havt við sær hóttandi vanda fyri mannalívi.
**c)** havt við sær, at farið er sokkið.

**2.11.2** Endurgjald kann verða veitt fyri upp til 10 viðtalur hjá sálarfrøðingi fyri hvønn persón, ið var umborð á farinum.

**2.11.3** Hevur hendingin kravt mannalív fáa eftirsitandi foreldur, systkin, hjúnafelagi/samlivari og børn somu rættindi, sum persónar, ið vóru umborð á farinum.

**2.11.4** Endurgjald verður bert veitt fyri sálarliga kreppuhjálp, um tørvurin er fráboðaður Betri Trygging seinast 3 mánaðir eftir hendingina.

**2.11.5** Endurgjald verður bert veitt fyri útreiðslur, ið ikki kunnu fáast endurgoldnar frá øðrum.

**2.11.6** Samlaða endurgjaldið fyri sálarliga kreppuhjálp í sambandi við eina hending verður tó ongantíð størri enn kr. 200.000.

## B. Tilvalstryggingar

## 3.0 Tryggingin kann eisini fevna um

Tryggingin fevnir bert um niðanfyri nevndu tryggingar, um tað er nevnt í tryggingarskjalinum.

**3.1 Skrokkinteressa**
**3.1.1** Henda trygging kann teknast við í mesta lagi 20% av skrokktryggingarhæddini.

**3.1.2** Endurgjald verður bert latið, um talan er um fullan skipsskaða.

**3.2 Snellur**
**3.1.1** Til ber at tryggja snellur umborð á farinum móti somu vandum sum skrokktryggingin annars fevnir um. Sjálvsábyrgd: Sí tryggingarskjalið.

**3.3 Veiða og útgerð**
**3.3.1** Tryggjaðir lutir:

Henda trygging fevnir um alt, sum farið hevur umborð av veiðu, ísi, salti, skipsvistum (provianti), olju, leysum fiskigreiðum og tílíkum, ið er ætlað til at brúka upp umborð.

**3.3.2** Henda trygging verður bara teknað soleiðis, at endurgjald bert verður latið, tá ið fullur skipsskaði er, ella tá ið skaðin beinleiðis er komin av eldi ella spreinging ella av tí, at farið søkkur, hvølvist, strandar, rennur á grunn ella rennur á annan fastan ella flótandi lut, heruppií ís.

**3.3.3** Verður endurgjald veitt, verður roknað við tí prísi fyri veiðuna, sum tað kann ætlast, at hin tryggjaði kundi fingið við sølu á vanligan hátt, um eingin skaði hevði gjørst, spardar útreiðslur frádrignar. Skaði á fiskigreiðir, meðan fiskað verður, verður ikki goldin.

**3.4 Manningarognir**
**3.4.1** Tryggingin av manningarognum tryggjar ábyrgd eigarans/útgerðarmansins sambært galdandi lóg ella sáttmála.

**3.4.2** Tryggingin kann harumframt teknast av privatum eigarum, sum ikki hava skyldu at tekna hesa trygging.

**3.4.3** Endurgjald verður bert latið, tá ið fullur skipsskaði er, ella tá ið skaðin beinleiðis er komin av eldi ella spreinging ella av tí, at farið søkkur, hvølvist, strandar, rennur á grunn ella rennur á annan fastan ella flótandi lut, heruppií ís, og um skaðin er av sjóskaða á farið og hesin skaði kemur undir endurgjald sambært tryggingartreytunum.

**3.5 Maskintrygging**
**3.5.1** Hendan eyka trygging er fyri annan skaða enn uttanífrákomandi skaðahending og fevnir um allar maskinur, ið eru 25 ár ella yngri.

**3.5.2** Eykamaskintryggingin er galdandi fyri skaðar á maskinu, hjálpimotor, leysamotor og uttanborðadrev.

**3.5.3** Sjálvábyrgdin er tann sama, sum er galdandi fyri skrokktryggingina.

# Bátatrygging

**3.5.4** Umframt sjálvábyrgdina verður frádráttur gjørdur í maskinendurgjaldinum, ið verður roknaður soleiðis:

| Aldur | Frádráttur |
|---|---|
| 0-5 ár | 0% |
| 6-10 ár | 10% |
| 11-15 ár | 30% |
| 16-25 ár | 50% |

Maskintryggingin heldur uppat tá maskinan er eldri enn 25 ár.

**3.5.5** Tó verður onki endurgjald latið tá atvoldin til skaðan er: slit, elli og teringur, ikki yvirhildin eftirlitssýn, vantandi røkt og beinleiðis sum óbeinleiðis skeiv viðferð av maskinrúmsinnsetingini, feilir í uppbyggingini ella tilfarinum og tá brekið kann skjótast inn undir galdandi garantitreytir.

**3.5.6** Verður endurgjald fyri skaða á maskinu latið eftir ásetingunum í § 155 í konventiónini, verður maskintryggingin ikki nýtt.

**3.6 Víðkað ábyrgdartrygging**
**3.6.1** Hendan trygging er fyri ábyrgd, sum ikki er fevnd av skrokktrygginini.

**3.6.2** Tryggingin tekur við tí endurgjaldsábyrgd, sum tryggingartakarin, sum eigari av farinum kemur undir fyri skaða, veldur í tryggingartíðini við nýtslu av farinum.

**3.6.3** Tryggingin tekur tó bert við ábyrgd tryggingartakarans:
**a)** Av týndum mannalívi og skaða á persón og fyri bjargiløn fyri bjarging av mannalívi.
**b)** Av týndum og skaddum lutum hjá triðjamanni og skaða av dálking.
**c)** Av burturtøku av vraki, sum verður áløgd tryggingar-takaranum innan 1 ár eftir skaðadagin.

**3.6.4** Tryggingartakarin skal í lógligan mun fráleggja og/ella avmarka sína ábyrgd í samsvari við viðtøkurnar í sjólógini. Tryggingin tekur ikki við tí øking í ábyrgdini, sum stavar frá, at hetta ikki er gjørt.

**3.6.5** Endurgjaldsupphæddin er fyri persónskaða kr. 10.000.000 fyri hvørja hending sær og fyri skaða á lutir kr. 5.000.000 fyri hvørja hending sær.

Gev gætur, at henda víðkaða ábyrgdartrygging hevur serskildar tryggingartreytir.

**3.7 Kosmetiskur skrokkskaði**
**3.7.1** Henda tilvalstrygging er fyri kosmetiska munin ímillum tað skadda og tað óskadda á egnum fari.

**3.7.2** Endurgjald verður latið fyri týðandi kosmetiskan mun ímillum tað skadda á skrokkinum, ið tryggingin fevnir um, og tað óskadda.

**3.7.3** Endurgjaldið fyri kosmetiskan skaða kann ikki verða størri enn endurgjaldið, sum skrokktryggingin fevnir um, tó í mesta lagi kr. 25.000 fyri hvørja hending sær.

**3.8 Lægri sjálvsábyrgd á ”Ábyrgd fyri samanstoyt”**
**3.8.1** Henda tilvalstrygging minkar um sjálvsábyrgdina, um tú gert skaða á far ella ogn hjá øðrum í sambandi við samanstoyt.

**3.8.2** Sjálvsábyrgdin verður ásett til kr. 2.500, uttan mun til sjálvsábyrgdina, sum stendur í tryggingarskjalinum. Er sjálvsábyrgdin í tryggingarskjalinum kr. 2.500, verður hon ásett til kr. 1.000.

**3.8.3** Sjálvsábyrgdin í tryggingarskjalinum er kortini altíð galdandi fyri hendingina, um endurgjald eisini verður veitt fyri skaða á egið far.

## C. Skaðafráboðan, skaðauppgerð v.m.

### 4.0 Verður skaði

**4.1** Tá ið skaði hevur verið, ella ein ber ótta fyri tí, skal tryggingin í stundini fáa boð um hetta, og tryggingartakarin skal, um til ber, samráðast við tryggingina um, hvat ið gerast skal, og fylgja teimum fyriskipanum, ið verða givnar hesum viðvíkjandi.

**4.2** Skipari og manning skulu, tá ið skaði hevur verið ella er at óttast fyri, eftir mesta førimuni royna at fyribyrgja ella minka um skaðan, bæði áðrenn og aftan á, at tryggingin hevur fingið boð um hann.

**4.3** Tryggingartakarin og skiparin skulu síggja til, at sjófrágreiðsla verður givin sum skjótast eftir reglunum í sjólógini, og at tryggingin um gjørligt verður boðað til sjófrágreiðsluna.

# Bátatrygging

**4.4** Í øllum førum skal skaði, um tryggingartakarin ikki skal missa rættin til skaðabót, verða fráboðaður tryggingini skrivliga innan 6 mánaðir aftaná, at tryggingartakarin fekk ella átti at hava fingið kunnleika um skaðan.

**4.5** Tá ið tryggingartakarin krevur skaða goldnan, skal hann prógva, at hann er umfataður av tryggingini, og sanna støddina á honum.

**4.6** Hann skal sum skjótast koma við øllum upplýsingum og prógvum, ið hann kann fáa til vega um viðurskifti, ið kunnu hava týdning, og til útrokningina av skaðabótum skal uttan óneyðugt drál verða send ein uppgerð yvir útreiðslur og tap, sum kanska verða kravd goldin, og skal henda uppgerð verða styðjað av neyðturviligum fylgiskjølum.

**4.7** Tryggjaði kann ikki uttan loyvi frá tryggingini viðurkenna ábyrgd fyri triðjamanni.

**4.8** Stuldur og herverk skulu beinanvegin fráboðast løgregluni.

## 5.0 Rætturin til endurgjald

**5.1** Felagið veitir endurgjald fyri kostnað til forsvarliga umvæling av skaða, sum kemur undir tryggingina.

**5.2** Endurgjald fyri máling og lakering verður bert veitt til tilfar, sum hevur samband við skaðan.

**5.3** Ber ein umvæling við sær, at farið minkar í virði, veitir felagið ikki endurgjald fyri hetta.

**5.4** Kostnaður til fyribils umvæling verður ikki endurgoldin uttan so, at felagið av hesi orsøk verður spart fyri útreiðslur, tá endalig umvæling er gjørd.

**5.5** Tryggingartakarin kann bert krevja endurgjald fyri partvísan skaða, um hesin verður umvældur og umvælingin er liðug.

**5.6** Ein og hvør skaði, sum kemur undir endurgjald, verður bert endurgoldin í tann mun skaðaupphæddin – útroknað eftir teimum fyri tryggingina galdandi reglum – er størri enn tann í tryggingarskjalinum tilskilaða sjálvábyrgd.

**5.7** Tá endurgjald fyri hjálparveiting og bjargingarløn til triðjamann verður latið, verður eingin sjálvábyrgd roknað.

**5.8** Tryggingin hevur skyldu til at veita neyðturviliga trygd fyri, at sleppast kann undan lógarhaldi, sum er orsakað av endurgjaldsábyrgd, sum kemur undir tryggingina.

**5.9** Tann tryggjaði hevur rætt til endurgjald fyri fullan skipsskaða – ella eins og fyri fullan skipsskaða tá:

**5.10** Farið er heilt farið.

**5.11** Farið hevur verið fyri óhappi, og tað verður hildið, at tað fyri rímiligan kostnað ikki kann bjargast.

**5.12** Farið er so skatt, at tað ikki loysir seg at fara undir umvæling.

**5.13** Hevur farið verið fyri óhappi, og heldur tryggingin, at kostnaðurin til bjargingartiltøk í sambandi við kostnaðin til umvælingina av skaðanum upp á farið verður størri enn tryggingarhæddin ella tryggingarvirðið, um hetta má haldast at verða lægri, hevur felagið rætt til at veita endurgjald eftir reglunum um endurgjald eins og fyri fullan skipsskaða.

**5.14** Tryggingarfelagið er harvið leyst frá allari ábyrgd fyri kostnaði til og fylgjum av bjargingartiltøkum, sum tryggjaði ikki longu er skuldbundin av, tá sagt verður frá, at felagið vil nýta henda rætt.

**5.15** Verður endurgjald veitt eftir hesi reglu, koma viðtøkurnar í konventiónini § 72 ikki til nýtslu. Tryggingin fer úr gildi frá omanfyri nevnda degi at rokna, og reglan í konventiónini § 41 kemur ikki til nýtslu. Felagið hevur krav upp á tryggingargjald fyri alt tað teknaða tryggingarskeiðið.

## D. Felagsreglur

## 6.0 Felags fyri allar fulnaðir

Niðanfyristandandi ásetingar eru galdandi fyri allar fulnaðir.

**6.1 Sjálvábyrgd**
**6.1.1** Sjálvábyrgdin, sum er avtalað, verður drigin frá øllum skaðum. Eru skaðarnir fylgjur av fleiri hendingum, sum ikki hava samband hvør við aðra, er sjálvábyrgdin galdandi fyri hvørja einstaka hending, sjálvt um tey tryggjaðu verða varug við teir einstøku skaðarnar samstundis og/ella teir verða umvældir samstundis.

# Bátatrygging

**6.1.3** Tá talan er um persónsskaðar er eingin sjálvábyrgd.

**6.1.4** Umframt ásettu sjálvábyrgdina, verða 25% drigin frá í endurgjaldinum fyri skaða á leysamotorar, uttanborða-drev, IPS skipanir, Waterjet og líknandi skipanir.

**6.2 Nýggjur eigari**
**6.2.1** Fær farið nýggjan eigara, skal tryggingarfelagið verða fráboðað um hetta innan 14 dagar, uttan so, at nýggj trygging er teknað við nýggja eigaranum.

**6.3 Kríggj, náttúruvanlukkur o.tl.**
**6.3.1** Tryggingin fevnir ikki um skaðar og ábyrgd fyri skaðar, sum beinleiðis ella óbeinleiðis standast av:

**6.3.2** Kríggi, krígslíknandi viðurskiftum, ella skaða, ið stendst av ófriðartilburðum, hendingum, ið standast av at gera seg inn á uttanveltað, uppreistri, samanbresti, borgarligum ófriði ella tiltøkum til vernd móti hesum, ognartøku, lóghaldi (upptøku) ella tílíkum.

**6.3.3** Verkfalli, verkbanni ella force majeure.

**6.3.4** Yvirgangi:
Við yvirgang er at skilja ein gerð/atgerð, íroknað – men ikki avmarkað til – brúk av makt og/ella harðskapi ella hóttan um, at makt og/ella harðskapur fer at vera nýttur, framd av einum ella fleiri persónum, uttan mun til um teir virka einsamallir ella í sambandi við ella í felag við ella vegna ein ella fleiri felagsskap/ir og/ella stjórnir og/ella myndugleikar, framd við politiskum, átrúnaðarligum, ideologiskum ella etniskum endamáli ella grundgeving, íroknað endamálinum at ávirka eina stjórn og/ella ein millumlandafelagsskap og/ella at skapa ótta í almenninginum ella parti av almenninginum.

**6.3.5** Dálkaðum bumbum v.m.:
Við dálkaðar bumbur er at skilja bumbur, rakettir o.tl. løddar við vanligum (konventionellum) spreingievni og dálkaðar við geislavirknum tilfari. Hesar bumbur verða vanliga nevndar dirty bombs.

Sama er galdandi fyri bumbur, sum eru dálkaðar við evna-frøðiligum, lívfrøðiligum ella bakteriufrøðiligum tilfari.

Bumburnar gera skaða bæði við fysisku ávirkanini av sjálvum bumbubrestinum og við, at dálkað tilfar verður spjatt yvir eitt størri ella minni øki.

**6.3.6** Jarðskjálvta, eldgosi ella aðrari náttúruvanlukku.

**6.3.7** Atomkjarnureaktiónum, t.d. kjarnukloyvingum (fissión) og kjarnusamansmeltingum (fusión) og geislavirkni.

**6.3.8** Dálking.

**6.4 Skyldur tryggingartakarans**
**6.4.1** Tryggingartakarin er skyldugur, skal hann ikki missa rættin til skaðabøtur, gjølla at fylgja fyriskipanum hjá tryggingini og øllum avgerðum, ið verða tiknar viðvíkjandi fari, sigling og farmi eins og øðrum viðurskiftum av týdningi fyri tryggingina.

**6.4.2** Før, ið liggja við bryggju ella teym, skulu altíð vera undir forsvarligum eftirliti.

**6.4.3** Hevur tryggingartakarin verið atvoldin í tilburðum við gerð ella vanrøkt, ið verður kend honum sum grovt gáloysi, verður farið eftir, hvussu stór skyldin er, og tilgongdini annars, og avgjørt, um skaði skal verða goldin, og um so verður, hvussu nógvur.

**6.5 Tryggingargjald**
**6.5.1** Er trygging nýteknað, fellur tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið til gjaldingar, tá ið tryggingin er teknað. Er komið ásamt um gjalding í pørtum, tá er fyrsta partagjald fallið til gjaldingar beinanvegin. Verður ein slík trygging endurnýggjað, fella tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið til gjaldingar á fyrsta degi í hesum nýggja tíðarbili. Er komið ásamt um gjalding í pørtum, fellur hvør eftirverandi partur til gjaldingar á fyrsta degi í tilsvarandi tíðarbili; í hesum føri verður skilað til, at tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið fella til gjaldingar frammanundan, hvørt fjórðingsárið, tá ið tryggingargjaldið verður roknað sum árstryggingargjald.

**6.5.2** Verða tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið ella partagjaldið fyri nýteknaða trygging ikki goldið, tá ið kravt er, er tryggingin loyst frá sínari ábyrgd. Sama er, um eftirverandi partagjald ikki verður goldið, áðrenn vika er liðin eftir krevjing, tá ið kravt er í fyrsta lagi eina viku fyri gjalddag. Í slíkum førum verður ábyrgdin hjá tryggingini aftur bindandi frá tí degi, goldið er, men eru 3 mánaðir lidnir, eftir at kravt er, og tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið ikki eru goldin, fer avtalan úr gildi, uttan so at onnur avtala er gjørd.

**6.5.3** Verða tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið ikki goldin, í seinasta lagi tann dagin, ið er settur sum seinasta gjaldsfreist á kravinum, sendir tryggingarfelagið áminning við upplýsing um, at tryggingarfulnaðurin heldur uppat, um tryggingargjaldið og avgreiðslugjaldið ikki verða goldin innan eina nýggja freist.

# Bátatrygging

**6.5.4** Møguligir skrásettir veðhavarar fáa samstundis fráboðan um eftirstøðuna.

**6.5.5** Avgreiðslugjald verður einans álagt privatar tryggingar.

**6.6 Prístalsjavning**
**6.6.1** Tryggingargjaldið verður prístalsjavnað árliga við brúkaraprístalinum hjá Hagstovu Føroya. Javnað verður tó altíð við í minsta lagi 1 prosenti í mun til árið fyri. Prístalsjavningin verður framd høvuðsgjalddagin.

**6.6.2** Heldur útgávan av almenna brúkaraprístalinum uppat, verður tryggingin prístalsjavnað við prístali, ið Betri Trygging ger/góðtekur.

**6.7 Uppsøgn**
**6.7.1** Tryggingin kann av báðum pørtum sigast upp skrivliga við eini freist upp á ein mánað.

**6.7.2** Tryggingin kann upp í ein mánað aftan á, at skaðaendurgjald er uppgjørt ella eftir, at skaðaendurgjald er avvíst, verða søgd upp av tryggingartakaranum/ tryggingarfelagnum við 14 daga skrivligari ávaring.

**6.8 Onnur trygging**
**6.8.1** Er tað ásett í aðrari tryggingaravtalu, sum fevnir um sama vanda, at ábyrgdin fellur burt ella verður avmarkað, um trygging er ella verður teknað aðrastaðni, eru somu fyrivarni galdandi fyri hesa trygging.

**6.9 Rættargongd**
**6.9.1** Bæði tryggingarfelagið og tryggjaði taka við rættar-gongd í Føroyum.

## E. Privatar tryggingar

### 7.0 Niðanfyristandandi ásetingar eru einans galdandi fyri privatar tryggingar

**7.1 Angringarrættur**
**7.1.1** Tryggingin kann verða strikað frá tekningardegnum, um tryggingarfelagið fær skrivliga fráboðan um tað, áðrenn 14 dagar eru farnir. Hetta merkir, at støðan verður, sum var tryggingin als ikki teknað. Møguligar útreiðslur, sum tryggingarfelagið hevur havt av tryggingini, kunnu krevjast afturgoldnar.

**7.1.2** Angringarrætturin er ikki galdandi fyri tryggingar, sum eru teknaðar fyri eitt tíðarskeið, ið er ein mánaður ella styttri.

**7.2 Ósemjur**
**7.2.1** Eru viðurskifti við felagið, ið tryggingartakarin er ónøgdur við, er hann vælkomin til, í fyrsta umfari, at seta seg í samband við okkum aftur. Vanliga mannagongdin er, at hann setir seg í samband við ta deildina, hann er ósamdur við.

**7.2.2** Talan kann vera um ymisk viðurskifti, t.d. í sambandi við, at trygging verður teknað, í sambandi við eina skaðaavgreiðslu ella onnur viðurskifti við felagið.

**7.2.3** Kann málið verða loyst á henda hátt, er tað tann besta, mest einfalda og skjótasta loysnin fyri báðar partar.

**7.2.4** Um semja ikki fæst, eru tríggir møguleikar at fara víðari við málinum, sí §§ 7.3 – 7.5.

**7.3 Innanhýsis kæruviðgerin hjá Betri Trygging P/F**
**7.3.1** Kærast kann fyri privatar tryggingar til innanhýsis kæruviðgeran hjá Betri Trygging.

**7.3.2** Kæran skal sendast skrivliga til felagið. Tað skal í skrivinum vera greitt, at talan er um kæru til kæruviðgeran. Kæran kann sendast við vanligum brævi ella við teldubrævi.

**7.3.3** Í kæruni skal greiðast frá, hvat tað er, sum ósemjan snýr seg um. Tað er ikki neyðugt at leggja tað samskiftið við, sum er farið fram skrivliga við tryggingarfelagið, men nýggj sjónarmið kunnu førast fram í kæruni.

**7.3.4** Kæran skal, tá talan er um vanligan post, sendast til:
Betri Trygging P/F
Kongabrúgvin
Postsmoga 329 FO-110 Tórshavn
ella við teldubrævi til: betri@trygging.fo
Teldubrævið skal stílast til kæruviðgeran.

**7.4 Kærunevndin**
**7.4.1** Fyri privatar tryggingar kann kærast til donsku kærunevndina.

**7.4.2** Skrivlig kæra – skrivað á donskum – skal sendast kærunevndini, saman við ávísum gjaldi. Um tryggingartakarin, heilt ella partvíst fær viðhald í kæruni, verður gjaldið afturrindað.

# Bátatrygging

**7.4.3** Á heimasíðuni hjá Ankenævnet for Forsikring er frágreiðing um, hvussu farast skal fram, tá kært verður. Sí: http://www.ankeforsikring.dk

**7.4.4** Um ivamál eru viðvíkjandi, hvussu kært verður til Ankenævnet for Forsikring, sendir felagið eftir umbøn oyðublað og faldara hesum viðvíkjandi. Felagið er til reiðar við hjálp og vegleiðing viðvíkjandi kæruni.

**7.4.5** Kæran skal sendast til:
Ankenævnet for Forsikring
Østergade 18, 2.
1100 København K
Tlf.: 0045 33 15 89 00
T-postur: ankeforsikring@ankeforsikring.dk

**7.5 Yvirsýn**
**7.5.1** Er tvídráttur um skaðauppgerðina, kunnu tryggingartakarin og tryggingarfelagið avtala at lata skaðauppgerðina avgera av óheftum metingarmonnum.

**7.5.2** Metingarmennirnir skulu, áðrenn teir fara til verka, velja ein uppmann, sum eisini skal verða óheftur. Koma teir ikki ásamt um uppmann, velur Sorinskrivarin hann.

**7.5.3** Metingarmennirnir gera uppgerðina í neyvum samstarvi við ásetingarnar í tryggingartreytunum og -skjalinum og gera eina skrivliga frágreiðing um, hvussu teir hava gjørt tapið upp.

**7.5.4** Yvirsýnið er endaligt og bindandi fyri báðar partar.

**7.5.5** Koma metingarmennirnir ikki ásamt um skaða-uppgerðina, er tað uppmaðurin, ið innan fyri rammurnar av tí, ið metingarmennirnir eru komnir til, skal gera úrskurð í málinum. Avgerð hansara er tá endalig og bindandi fyri báðar partar. Metingarmennirnir avgera somuleiðis, hvussu kostnaðurin av yvirsýninum verður at býta millum partarnar.

**7.6 Rættarhjálp**
**7.6.1** Fulnaður verður veittur sambært tryggingartreytunum fyri rættarhjálpartrygging, sum Forsikring og Pension ásetir fyri tryggingarfeløg. Tryggingartreytirnar verða útflýggjaðar eftir áheitan.

**7.6.2** Alment kann sigast, at rættarhjálpartryggingin fevnir um ein part av útreiðslum tryggingartakarans í sambandi við ávísar ósemjur, ið tryggingartakarin sum eigari, brúkari ella førari av skrokktryggjaða farinum er partur í. Endurgjaldið kann í mesta lagi vera kr. 200.000 og sjálvsábyrgdin er 10% av útreiðslunum – tó í minsta lagi kr. 2.500.

**7.6.3** Fyri at fáa rættarhjálp skal tryggingartakarin seta seg í samband við advokat. Heldur advokaturin, at møguleiki er fyri at fáa rættarhjálp, skal advokaturin biðja tryggingarfelagið um at veita rættarhjálp tryggingartakarans vegna. Tryggingarfelagið skal síðani taka endaliga støðu.

**7.6.4** Í sambandi við, at advokaturin skal meta um møguleikarnar fyri fríari rættarførslu, skal tryggingartakarin lata advokatinum skattauppgerð fyri seg sjálvan og hjúnafelaga/sambúgva.

**Undantøk**
**7.6.5** Tryggingin fevnir ikki um før, sum verða nýtt vinnuliga.

**7.6.6** Tryggingin fevnir ikki um mál, sum hava sín uppruna í, at privat før verða nýtt vinnuliga.